# Eingin nýggj inntøkutrygd uttan treytir

**INNTØKUTRYGD** Bæði Føroya Reiðarafelag og manningarfeløgini eru samd um, at inntøkutrygd fiskimanna skal liggja hjá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, men hetta kann ikki gerast uttan ávísar treytir og broytt vinnugrundarlag. Spurningurin er, um landsstýrið megnar at liva upp til hesar treytir – og um ikki, hvør verður so lagnan hjá inntøkutrygd fiskimanna, sum ikki er við í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2011



» ...líkt er ikki til, at tær treytir, sum vinnufeløgini hava sett fyri at vilja yvirtaka skipanina við inntøkutrygd, fara at halda...
EYÐSTEIN DJURHUUS

Vilmund Jacobsen

Føroya Reiðarafelag hevur sagt allar sáttmálar við manningarfeløgini upp. Sáttmálin við Føroya Fiskimannafelag gongur út hin 1. desember, og sáttmálarnir við ávikavist Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Maskinmeistarafelagið ganga út hin 1. januar 2011.

Viberg Sørensen, formaður í Reiðarafelagnum, sigur, at í verandi sáttmálum millum partarnar stendur, at verða broytingar gjørdar í inntøkutrygd fiskimanna, fellir sáttmálin burtur.

- Nú politisku myndugleikarnir ætla, at inntøkutrygdin skal liggja úti hjá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, sum eru Reiðarafelagið og manningarfeløgini, halda vit tað vera greiðast og best at siga allar sáttmálarnar upp, sigur hann.

## Ikki treytaleyst

Reiðarafelagið og manningarfeløgini hava annars sagt seg taka undir við, at vinnan sjálv átekur sær inntøkutrygdina, men feløgini taka ikki treytaleyst undir við hesum.

Ein treyt er, at landið kemur við 10 miljónum krónum um árið í einum 5-ára tíðarskeiði – ella við 50 miljónum krónum tilsamans. Líkt er kortini ikki til, at landsstýrið vil lata meiri pening til inntøkutrygd, tí eingin peningur til hesa trygd er settur av í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2011.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, segði herfyri við útvarpið hjá Kringvarpinum, at uppskotið hjá vinnuni um at lata 10 miljónir krónur um árið í fimm ár til trygdargrunn fiskivinnunnar, sum grunnurin ætlandi verður róptur, neyvan fer at vinna frama í landsstýrinum.

Eyðstein Djurhuus, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag, vísir á, at tað er umráðandi fyri eina nýggja skipan um inntøkutrygd, sum fer at liggja hjá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, at grundarlagið í útgangsstøðinum verður í lagi.

- Saman við reiðarafelagunum eru manningarfeløgini samd um, at nakrar treytir mugu uppfyllast. Hetta hava feløgini eisini boðað landsstýrinum frá í einum tilmæli, sum feløgini lótu av hondum fyri fáum vikum síðan.

Hann vísir á, at vinnufeløgini havt lagt upp til, at fyritreytirnar eitt nú eru hesar 10 miljónir krónurnar yvir fimm ár, og at tað almenna vil veðhalda fyri útgjaldsskylduni hjá nýggja grunninum.

## Frítt at landa

- Ein onnur treyt er, at skipini sleppa at avreiða, har tey vilja – og ikki sum nú, har skip bert kunnu avreiða ein fjórðing av veiðini uttanlands. Aftrat hesum vil vinnan eisini tryggja sær, at skip, sum royna undir Føroyum, eisini sleppa at virka fiskin umborð, um tey ynskja tað, sigur Eyðstein Djurhuus.

Men hetta eru ikki einastu treytirnar hjá vinnufeløgunum fyri at taka undir við, at inntøkutrygdin kemur at liggja hjá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum – og ikki í landskassanum, har hon hevur ligið síðan í endanum av sekstiárunum.

Feløgini halda eisini, at stovnsfæið hjá Trygdargrunni fiskivinnunnar eigur at verða 150 miljónir krónur og vísa í hesum sambandi á tríggjar grunnar, sum eiga 81 miljónir krónur tilsamans.

Hesir grunnar eru Trygdargrunnurin fyri avreiðingar og lønir, sum eigur 35 miljónir, Frítíðargrunnurin, sum eigur 17 og Forskotsgrunnur fiskivinnunnar, sum eigur 29 miljónir krónur.

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, hevur áður sagt, at tað neyvan ber til at fara eftir Frítíðargrunninum, tí hesin er longu markaður til annað endamál. Neyðugt er eisini, at samráðingar vera um Trygdargrunnin, sum er undir fíggjarmálaráðnum. Í triðja lagi hevur Forskotsgrunnur fiskivinnunnar givið Havstovuni tilsøgn um 10 miljónir krónur til nýtt havrannsóknarskip, men løgtingið hevur enn ikki staðfest hesa gávu við lóg enn.

Eyðstein Djurhuus vísir á, at eitt annað, sum vinnufeløgini eisini hava sett sum treyt er, at fleiri gjøld ikki verða álógd fiskiskipa-



*- Skip og manningar, sum fiska væl, koma at gjalda ein størri part inn í grunnin, meðan tey, sum fiska mini væl, gjalda minni. Hetta fer soleiðis at virka sum ein útjavningarskipan, sigur Eyðstein Djurhuus*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Eysturkommuna

**Námsfrøðingur til Brúsa í Leirvík**

Søkt eftir 1 námsfrøðingi í tíðaravmarkað starv frá 20. november 2010 til 31. oktober 2011, fyri námsfrøðing í barnsburðarfarloyvi. Talan er um starv á 35 tímar um vikuna. Um ongin námsfrøðingur søkir, verður hjálparfólk sett ístaðin.

**Førleikakrøv**
Vit søknast eftir einum starvsfólki, ið er nýhugsandi, ígongdsetandi, tekur ábyrg og dugur at skapa ein tryggan, spennandi og mennandi dag saman við børnum og starvsfólkum í einum nýggjum stovni við nógvum spennandi avbjóðingum.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skulu sendast til Eysturkommunu, Postboks 30, 510 Gøta. Umsóknarfreistin er fríggjadagin 15. oktober 2010 kl. 12.00.
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sigvør Gregersen, stovnsleiðara á telefon 73 00 41.